Starvslýsing

Heimatænastan

# Roknskaparfólk til Røktarheimið á Mørkini

Vegna farloyvi søkja vit eftir avloysara fyri roknskaparfólkið á Røktarheiminum á Mørkini at arbeiða fulla tíð í tíðarskeiðinum: 01.02.08 til 01.04.09.

**Arbeiðsuppgávur:**
- At føra roknskaparhaldið fyri stovnin
- Saman við økisleiðaranum at leggja fíggjarætlanir
- Regluliga kunna um fíggjarstøðuna hjá stovninum
- Skipa fyri innanhýsis fíggjarstýring og dagføra hesar í mun til inntøkur og útreiðslur

**Umframt roknskaparuppgávur fevnir arbeiðið eisini um aðrar fyrisitingarliga uppgávur, so sum:**
- Journal
- Skrivari hjá leiðaranum
- Lønaravgreiðsla
- Telefonavgreiðsla, heinta post o.a.

**Fyrimunur er, at tú hevur:**
- Viðkomandi útbúgving
- Góðan telduførleika
- Kunnleika til FSL bókhaldsskipan landsins
- Ert fleksibul og hevur evni at læra nýtt
- Royndir innan almenna fyrisiting
- Dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur

Røktarheimið á Mørkini er partur av Heimatænastuni Vágar/Norðstreym, og tí umfatar starvið eisini fyrisitingarligar uppgávurnar hjá Heimatænastuna úti í økinum

**Setanarviðurskifti**
Lønar- og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.
Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er Heimatænastan .

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jórun Wolles, roknskaparfólk tlf. 282050 ella Sonju Klein, økisleiðara tlf. 282249.

**Umsókn:**
Skrivlig umsókn saman við prógvi og møguligum viðmælum verður at senda til:

Heimatænastan Vágar/Norðstreymoy
Att: Økisleiðarin
Heilsumiðstøðin
370 Miðvágur

**Umsóknarfreist: 11. januar 2008 kl. 15.00**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo

# Toll- og Skattstova Føroya

Toll- og Skattstova Føroya er stovnur undir Fíggjarmálaráðnum, hvørs uppgáva er at fyrisita toll- og avgjalds-skattalógina og skuldarinnkrevja innan málsøkini hjá stovninum.

Stovnurin hevur 135 starvsfólk og er skipaður við einum stýri og trimum økisskrivstovum.

Stýrið heldur til á Argjum og høvuðsskrivstovurnar í Norðurøki, Miðøki og Suðurøki halda til í ávikavíst Saltangará, Tórshavn og á Tvøroyri.

Á Miðøkinum, har viðkomandi kemur at starvast, eru 60 starvsfólk.

www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo

Víðka tær sjónarringin
– royn annað starv styttri tíðarskeið!

## Í næstum fara tvey starvsfólk á

# Miðøkinum

## í barnsburðarfarloyvi

**Vit eru** ein livandi stovnur við støðugum broytingum, sum skal tillaga seg lógarbroytingum og umstøðum annars. Tí er avgerandi, at tú, ið settur verður, tolir broytingar í starvsinnihaldinum, um tað gerst neyðugt.

**Vit ímynda okkum** at tú hevur útbúgving sum Cand merc., HD ella aðra líknandi útbúgving. Harumframt vænta vit, at tú ert framskygdur, ábyrgdarfullur, hevur góð samstarvsevnir, skapar úrslit og gert títt til at skapa arbeiðsgleði.

Skuldi tú havt HH, skrivstovuútbúgving ella aðra líknandi og hevur møguligar ætlanir um at útbúgva teg víðari innan roknskap og grannskoðan, so ert tú eisini vælkomin at søkja.

**Arbeiðsuppgávur eru á eftirlits- og innheintingardeildini**
- samskifti við virkir og stovnar
- vitja fyritøkur
- eftirlit við skatta- og avgjaldsuppgerðum
- ummæla kæru- og dómsmál
- málsviðgerð

Vit bjóða eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt arbeiði, har hvør dagur er opin fyri fakligum avbjóðingum og har tú hevur møguleika at ávirka arbeidsgongdina. Eisini kunnu vit bjóða fleksarbeiðstíðir.

**Setanarøkið er Miðøkið**, men starvið fevnir annars um allar stovnar undir Fíggjarmálaráðnum.

**Starvið verður lønt** eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag og er treytað av starvsroyndum, starvsinnihaldi og útbúgving.

**Áhuga**, ið vilja vita meira um starvið kunna venda tær til Eyðun Joensen, deildarleiðara á tlf. 352600

**Send umsókn** saman við avritum av prógvum og ummælum til Toll- og Skattstovu Føroya í seinasta lagi 7. januar 2008, kl. 15.00.

Viðmerk: umsókn Miðøkið

**Toll- og Skattstova Føroya**
Postsboks 2151
FO-165 Argir

*Okkara fakliga vitan er grundarlagið undir dygdargóðari tænastu!*

# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00

TÍÐINDAVAKTIN
ALT VIKUSKIFTIÐ

VIVA



FORM

Betongarbeiði

Sethúsagrundir
Garðar
Lendisgólv
og annað

Sp/f. FORM
Skákið 13
FO 480 Skáli

Tlf. 442600
212602
form@form.fo

# Skattalistin

Skattalistin fyri Leirvíkar Kommunu fyri árið 2006 liggur frammi til alment eftirlit á Kommunuskrivstovuni frá 03. januar til 17. januar 2008 báðir dagar íroknaðir.

**Skrivstovan er opin:**
Mánadag – Hósdag kl. 10.00 – 14.00
Fríggjadag er stongt.

LEIRVÍKAR KOMMUNA

**Leirvíkar Kommuna**
Postboks 42 · 520 Leirvik